

**PERLUMÁL**

### SMS-boð um dystin:

*»Lekkurt at hava ein heilan bonk av unglingum, sum altíð eru klárir at tradka til. Og válafturkomin til Inga. Go B36«*

*»Í dag vísti B36 í hvørjum enda teir í ár fara at enda«*

*Afturvendi Ingi Højsted (8) fegnast saman við tvímálskjúttanum, Róaldi Jacobsen, eftir at hann við frálíkum langskoti, endaliga avgjørdi dystin í Sørvági*

Mynd: Álvur Haraldsen

# Róaldur var vakin

**VODAFONEDEILDIN** Við tveimum málum syrgdi Róaldur Jacobsen fyri, at B36 tók stigini við sær úr Sørvági til Havnar. B36 skapti fleiri kjansir og stóð í verjupartinum sterkari enn 07 Vestur, sum ongantíð kom fyri seg eftir skjótu leiðsluna hjá gestunum

Hilmar Jan Hansen

| | |
|---|---|
| 07 Vestur | 0 |
| B36 | 3 |

Undan dystinum á Dungasandi í Sørvági millum 07 Vestur og B36 kundi tað sæð opið út, tí hóast 07 Vestur er uppflytari, kom liðið sannførandi víðari í steypakappingini, meðan B36 mátti lúta í sínum dysti. Og tá 07 Vestur var uppi í Vodafonedeildini fyri tveimum árum síðani, vann liðið báðar sínar dystir ímóti B36.

Men hesa ferð gjørdist øðrvísi, og helst hevði skjóta leiðslumálið hjá B36 sína ávirkan á, at so varð. Tað vóru ikki farnir meira enn gott og væl tveir minuttir, tá ein heimleys afturlegging endaði fyri fótunum á Róaldi Jacobsen, ið var kaldur og takkaði fyri gávuna.

– Eg má siga, at eg trúði ikki ordiliga upp á tað, tí eg tamdi bóltin ov langt frá mær og hevði mist hann. Men tá so verjuspælarin hjá teimum feilmetti bóltin, kundi eg bara taka hann og lobba upp um málmannin, sigur Róaldur, ið eitt korter fyri dystarlok staðfesti sigurin, tá hann skoraði til 3-0.

Tá tók hann sakina í egnar hendur, dró úr vinstru síðu inn á miðásina og meddaði til, staddur einar 20 metrar úr málinum hjá 07 Vestur: – Tey flestu hildu kanska, at bólturin kom í tríkantin, men hann kavaði, tá hann kom inn ímóti málinum, so málmaðurin hevði ongan møguleika at røkka eftir honum.

Málið til 2-0 fekk B36 eitt korter inn í seinna hálvleik eftir eitt hornaspark í høgru síðu, sum Suni Olsen við vinstra beini sendi flatt inn ímóti fremru stong, har verjuspælarin, Símun Joensen, fekk smoygt sær fram um ein verjuspælara hjá 07 Vestur og við innarsíðuni sent í málið.

## B36 megnaði meira

Talan var ikki um ein sprudlandi ella so øgiliga væl spældan dyst, men báðir partar vildu allíkavæl gjarna spæla við. 07 Vestur hevði ta fyrstu løtuna góðar taktir, men nokk so skjótt hevði B36 fingið fullkomuligt tamarhald á verjupartinum, og tá fyrsta havnarmenninir høvdu fótað sær, sleptu teir ikki takinum aftur.

07 Vestur slapp at spæla saman longur afturi á vøllinum, men so skjótt sum vágamenninir komu um miðjuna og høvdu hug at nærkast, sluppu teir ikki longur. Ta einu ferðina raktu teir stongina og í seinna hálvleiki hevði Jovan Panic eina góða skotroynd, men annars var øgiliga smáligt við atsóknum frá heimaliðnum.

Hinvegin megnaði B36 at skapa munandi meira í álopspartinum, og umframt at raka stongina hjá 07 Vestur, komu eitt nú Lukasz Cieslewicz og Heini í Skorini í góðar skotstøður, men uttan at vera nóg neyvir. Ta einu ferðina var Cieslewicz púra leysur fyri málinum, men 07 Vestur-málverjin, Hans Jørgensen, vísti sínar bestu dygdir og bjargaði meistarliga.

– Hetta var akkurát tað, sum vit fóru eftir, sjálvt um eg ikki haldi, at vit spældu so øgiliga væl, staðfestir Róaldur Jacobsen, ið var vakin, tá hann fekk sínar møguleikar, og tí kundi B36 fara aftur úr Sørvági við einum uppibornum sigri, ið kanska boðar frá góðum eftir tvey rakár hjá árstalsfelagnum í høvuðsstaðnum.

## Skjótt mál broytti alt

Hilmar Jan Hansen

Vágamenn løgdu bragdliga fyri í steypakappingini, tá teir vunnu 3-0 á FC Suðuroy, men í gjár máttu teir sjálvir leggja rygg til eitt 3-0 tap, tá B36 vitjaði á Dungasandi í Sørvági. Longu í triðja minutti kom B36 á odda 1-0, og tað helt venjarin hjá 07 Vestur hava stóran týdning fyri gongdina í dystinum:

– Vit settu teir sjálvir í gongd, og tað haldi eg oyðilegði alt fyri okkum, tí skjóta málið hjá teimum broytti eitt sindur upp á dystin. Eg haldi, at vit skaptu nóg mikið til at fáa mál, men saknur var í Tór-Ingar Akselsen, sum var burturstaddur hesa ferð, sigur Hegga Samuelsen, sum tó ikki væntar, at hesin eini dysturin skal oyðileggja kappingarárið hjá 07 Vestur.

– Nei, vit gera nakrar feilir, sum vit mugu royna at arbeiða við, og fáa vit betra tað, skal tað nokk ganga hjá okkum.

Odmar Færø, sum spælir í miðverjuni hjá B36, helt eisini, at tað skjóta málið gjørdi sítt til, at tað bleiv lættari hjá B36 at vinna dystin:

– At vit fáa eitt skjótt mál, ger tað lættari hjá okkum, men annars helt eg ikki, at vit fingu spælið at koyra fyrsta korterið. Men so batnaði tað hjá okkum og vit kundu koyra sigurin heim. Hetta vóru vit rættiliga væl nøgdir við, tí vit søgdu áðrenn, at vit skuldu bara hava trý stig, sigur Odmar, sum ikki helt, at 07 Vestur var so vánaligt, hóast trý mál vóru á muni, tá dysturin var av.

– Eg haldi, 07 Vestur gjørdi tað gott og spældi til tíðir minst líka væl sum vit, so tað skal ikki undra meg, um 07 Vestur megnar at yvirliva í bestu deildini í ár.

*hilmarjan@sosialurin.fo*